# tíð hetjan

sum eitt illmenni, og so var hann heiðin afturat. Tann myndin hóskaði ikki til lærdómin, eg hevði heimanífrá.

Tað er týdningarmikið at fáa staðfest okkara søgu, og tað er týdningarmikið at brúka søguna. Allar tjóðir í øllum heiminum brúka sína søgu til tjóðarbygging. Eisini Føroyar skulu brúka sína søgu til tjóðarbygging. Søgan um Trónd í Gøtu og hansara samtíð er ein hin mest spennandi parturin av okkara søgu. Hon umfatar eisini Sigmund Brestisson, og tað skal vera rúm fyri báðum hesum gørpum í søgu okkara.

Vit hava nógv at takka tykkum fyri, sum hava virkað fyri at reisa minnisvarða yvir Trónd í Gøtu og síðani hava skipað fyri tróndardøgum, har ymiskir tættir í Føroya elstu søgu hava verið tiknir fram.

Tit hava við hesum staðfest hansara pláss í okkara universi við eini konkretari standmynd, so Sigmundur ikki stendur einsamallur. Men eisini við ymsu tiltøkunum hava tit givið okkum øllum pláss at kjakast um og menna okkara vitan um forna føroyska søgu – uttan fordómar. Og so langt komu vit týsdagin, at írsku serfrøðingarnir førdu fram prógv um forna írska búseting í Føroyum, og prestur segði seg ikki ivast í, at Tróndur hevði tikið við keltiskt kristnari trúgv tíðliga í tíðini.

## Naddoddur fann Amerika

Eitt er, hvat akademikarar fáa burturúr søgugransking. Eitt annað er at siga søgur.

Tað ger ikki petti, um vit brúka søguna positivt, tá vit skulu gera vart við okkum uttan fyri Føroyar.

Eg hitti ein íslending ein dagin, sum hevði virkað innan ferðavinnuna í USA í nógv ár. Hann spurdi, um eg visti, hvør norðurlendingur oftast varð havdur á munni í Amerika? Eg grundaði og gav nøkur uppskot – Bjørk, A.P. Møller, Victor Borge, men nei. Rætta svarið var Jónas Bronch, sum jú legði grundina undir New York. Tá sigi eg við hann, at tíverri hava vit ongantíð fingið staðfest endaliga, at hann var føroyingur, sum vit hava hildið, tí onkur sigur nú, at hann kom úr Hollandi.

Tá risti íslendingurin á høvdinum og mælti: Høvdu vit bara minsta ferilin av møguleika at gera hann til íslending, so høvdu vit langt síðan gjørt tað. Latið ikki hollendingar fara við honum! Hetta er jú ein fín søga!

Og eg má geva honum rætt. Tá tað snýr seg um marknaðarføring, so minnast fólk eina góða søgu. So nú fortelji eg hvørja ferð um drongin, sum fór úr Føroyum sum ungur sjómaður og endaði við at grundleggja New York.

Og eg kundi ikki droymt um at sagt frá søguni um víkingar við sjóverki, sum settust upp í Føroyum. Tað er nógv stuttligari at siga frá Naddoddi – einum av fyrstu føroyingunum, sum var tiltikin sjómaður og navigatørur. Tað var hann, sum leiddi íslendingar og norðbúgvar til Amerika. So vit hava ikki bara grundlagt New York. Vit funnu eisini Amerika!

Og hvat gjørdu írsku munkarnir í Føroyum, jú, teir skrivaðu av fornar grikskar og rómverskar bøkur og vísindaverk, sum annars vóru farin fyri skeyti í barbarisku miðøldini, og soleiðis varð stórur partur av vesturlendsku sivilisatiónina í roynd og veru bjargaður í Føroyum.

Og hvar er heimsins elsta ting? Í Íslandi? Nei, tað er á Tinganesi í Havn.

Og hava tit nakrantíð hugsað um, hvussu lættliga Sverri í Kirkjubø hertók alt Noreg í 1100-talinum? Tað gekk so lætt og skjótt, at ongin rættiliga registreraði, at Føroyar høvdu hertikið Noreg.

Tá eg so ein dagin herfyri var saman við nøkrum írskum starvsbrøðrum og fortaldi teimum, at ættfaðir mín, Tróndur í Gøtu, sum eg meti vera 24 ferðina tipoldurabbi mín, var langabbasonur navnframa Ólav Hvíta kong, sum ráddi fyri borgum í Dublin fyri 1150 árum síðani, ja, tá var ikki eitt eyga turt.

## Byggja land í samstarvi

Eg vóni, tit orka at halda dampinum uppi í Gøtu. Nú fáa tit lorvíkingar afturat tykkum at lempa uppí, so tað skuldi bara styrkt um støðuna. Vit vilja fegin vitja aftur til fleiri tónleikatiltøk og víkingadagar.

Allir føroyingar taka støðu til Trónd í Gøtu. Annaðhvørt hann var frælsishetja, bølmenni, kristin, heiðin, frælsisstríðsmaður ella sjálvsøkin. Sjálvt standmyndina av honum stendst stórt kjak av. Men í grundini snýr øll søgan um Trónd í Gøtu seg um okkara eksistens, og tí er hon so áhugaverd. Og tí er tað so sera umráðandi, at tit halda fram við tiltakinum Tróndardagar komandi árini.

Vit hava brúk fyri at skilja okkara søgu betur og at skapa toleranta rúmd fyri ymiskleikum í fatanum, tí tá ber eisini til at fáa allar føroyingar at fylkjast um at byggja okkum eitt sjálvbjargið land í samstarvi heldur enn í stríði hvør við annan.

Tøkk fái tit fyri hesi tiltøk í vikuni, sum brátt runnin er, og tøkk fái tit fyri at reisa minnisvarðan yvir Trónd í Gøtu og havið framhaldandi eina góða víkinganátt og eitt gott G! Mini.

*Standmyndin av Tróndi í Gøtu*
*Mynd: Jan Müller*

